# Fiskimenn tjena minni



Hóast danskir fiskimenn hava fiskað meiri higartil í ár enn um somu tíð í fjør, hava teir fingið minni burturúr. Ein uppgerð fyri fýra teir fyrstu mánaðirnar av árinum vísir, at 10 prosent meiri kom upp ´land, men at inntøkan hjá fiskimonnunum kortini var 15 prosent minni enn í sama tíðarskeiði í fjør. Ein talsmaður fyri fiskimenninar sigur við Ritzau, at altjóða fíggjarkreppan hevur skyldina av gongdini, tí kreppan hevur gjørt, at prísurin á øllum fiski til matna er fallin munandi. Talsmaðurin leggur afturat, at danski fiskiflotin kann ikki halda fram við verandi umstøðum leingi afturat.

# Bankar mugu skapa álit

Í einari nýggjari meting av teimum donsku bankunum skrivar Tjóðbankin, at nógvir bankar kunnu fáa trupulleikar, um fíggjarkreppan verður drúgv og hørð. Í metingini skrivar Niels Bernstein, tjóðbankastjóri, at bankarnir mugu fyrireika seg til, at tann jaliga ávirkanin av teimum báðum almennu bankapakkunum verður ikki varandi. Stjórin skrivar, at bankarnir noyðast at arbeiða fyri at endurreisa álitið og at fremja neyðugar tillagingar, so teir ikki fáa trupulleikar, tá bankapakkarnir missa sína ávirkan. Tjóðbankastjórin hevur skrivað tilmælini eftir at hava kannað 14 teir størstu bankarnar í Danmark, skrivar Ritzau.



*Nú er Jákup Pauli Joensen heima hjá foreldrum sínum í Klaksvík, meðan hann fær nøkur pappír í lagi. Men tað vóru bara fimm sekundi av umhugsni, sum bjargaðu 34 ára gamla klaksvíkinginum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var hetta val – at síggja konuna – sum syrgir fyri, at hann 29. juni sleppur í føðingardag hjá konuni, at hann sleppur at mynstra aftur, og at hann sleppur aftur í fittligu grønu húsini eitt sindur uttanfyri Rio.

# AF 447 minutt fyri minutt

**Sambært BBC gekk tað soleiðis fyri seg, áðrenn AF 447 fór frá at vera eitt vanligt rutuflogfar til at vera ein sonn vanlukka. Síðan eru eisini fleiri upplýsingar komnir fram. Tó er ikki greitt, nær flogfari rakti Atlantshav, men frágreiðingar skulu vera klárar í endanum av hesum mánaðinum**

Sunnudagur 31. mai

**23.03:** AF 447 fer úr Galleao flogvøllinum í Rio de Janeiro, við kós ímóti for Charles de Gaulle flogvøllinum í París.

Mánadagur 1. juni

**02.33:** Seinasta sambandi við flogfari, sambært brasilska flogvápninum
**02.48:** Flogfari fer av radaranum 350 kilometrar frá brasilsku strondini
**03.00:** AF 447 fer inn í øki, har ódnarveður er, sambært Air France
**03.14:** Fleiri sjálvvirkandi boð koma úr flogfarinum um trupulleikar við elektronikkinum
**08:15:** Air France ger av, at støðan er krittisk. Ætlanir verða gjørdar um krisusentur
**10.10:** Flogfari átti at lenda í Charles de Gaulle í Paris
**10.35:** Franskir flogmyndugleikar boða almenninginum frá, at AF 447 er burtur
**11.17:** Brasilska flogvápnið boðar frá, at fari er at leita eftir flogfarinum tætt við Fernando de Noronha oyggjarnar, sum hoyra til Brasiliu
**11.36:** Air France váttar, at felagið ongi tíðindi hevur frá flogfarinum
**12.16:** Franski orkumálaráðharrin sigur, at nú hevði onki brennievni verið eftir, og at mann nú kann rokna við tí ringasta. Hann staðfestir tó, at talan ikki er um eitt flográn
**12.40:** Brasilska flogvápnið boðar frá, at flogfari var komið langt inn yvir Atlantshavi, tá tað bleiv burtur
**12.42:** Air France váttar, at boð vóru komin um elektróniskar trupulleikar
**13.13:** Air France greiðir frá, at elekrónisku trupulleikarnir kunnu hava staðist av snarljósi
**16.15:** Boð koma, at størsti parturin av teimum 228 fólkunum eru úr Brasiliu, meðan fraklendingar og týskarar eisini eru umboðaðir
**17.32:** Talsmaður hjá Air France váttar, at 80 fólk eru úr Brasiliu og at týskarar, italiufólk, amerikanar, kinesarar, bretar og spaniólar eisini vóru við
**17.51:** Nicolas Sarkosy, franskur forseti, sigur, at møguleikin at finna fólk á lívi er »øgiliga lítil«
**19.10:** Air France leysgevur ferðafólkalistan, sum vísir, at tey flestu umborð vóru antin úr Brasiliu ella Fraklandi. 32 lond eru umboðað. Minst seks norðurlendingar vóru umborð

Týsdagur 2. juni

**13.30:** Vraklutir verða sæddir úr brasilskum flogfari 650 kilometrar í ein landnyrðing úr Fernando do Noronha oyggjunum
**21.09:** Brasilskir myndugleikar vátta, at vraklutir eru funnir

Mikudagur 3. juni

**10.00:** Almennur franskur serfrøðingur sigur, at vánirnar fyri at finna svørtu kassarnar ikki eru stórar, tí dýpið er stórt og botnurin óslættur

Hósdagur 4. juni

**18.30:** Ivi verður sáddur, um nakrir vraklutir av AF 447 eru funnir



*Tað er ikki greitt, júst hvar og nær AF 447 rakti havyvirflatuna, men hesin grafikkur vísir, at flogfari rakti ódnarveður millum Suðurameriku og Afrika*



*Útlendskir miðlar greiða frá, at mikudagin var minningargudstænasta í Notre Dame í Paris fyri teimum, ið ikki vóru eins heppin og Jákup Pauli Joensen*

# Minningargudstænasta mikudagin

Longu í fyrradagin varð minningargudstænasta hildin fyri teimum, sum vóru við AF 447. Gudstænastan varð hildin í Notre Dame í Paris, og nógvar religiónir, sum vóru umboðaðar umborð, vóru eisini umboðaðar í stóra katedralinum í Paris, har tey deyðu vórðu mint.

Gudstænastan endaði við yrkingini, fótaspor í sandinum, ella Passos sobre a areia, sum brasilski høvdundurin Ademar de Barros hevur skrivað í samband við hendingina.

Umboð fyri Air France luttóku eisini til minningargudstænastuna. Tey vóru har fyri at syrgja yvir sínum starvsfeløgunum, samstundis, sum tey skipaðu fyri gudstænastuni.

